# Útboð eftir royndum KT-verkætlanarleiðara




Undirvísingarstýrið

# Yvirlit

1 KT-verkætlanarleiðari ........ 2
2 Heildarætlanin ........ 2
3 Tíðarætlan ........ 3
4 Verkætlanarskipan og høvuðsuppgávur ........ 4
5 Væntað tímatal og arbeiðsstaður ........ 4
6 Krøv til verkætlanarleiðara ........ 4
7 Krøv til tilboðið ........ 5
8 Meting av tilboðum ........ 6
9 Tíðarfreistir ........ 8
10 Nærri kunning ........ 9

# 1 KT-verkætlanarleiðari

Undirvísingarstýrið lýsir við hesum útboði eftir royndum kt-verkætlanarleiðara til verkætlanina KT-heildarætlan fyri undirvísingerverkið. Starvið er galdandi í umleið eitt ár fyri tíðarskeiðið frá 15. november 2025 til og við 15. november 2026. Verkætlanarleiðari skal tryggja eina væl skipaða og effektiva íverksetan av Kervi+ og Skúlanet á miðnámsskúlaøkinum. Verkætlanin skal verða framd í seinasta lagi 1. november 2026.

# 2 Heildarætlanin

Yvirskipaða endamálið við kt-heildarætlanini er at menna og reka ein datadrivnan undirvísingargeira, sum kann økja um dygd og trygd í umsiting, ráðlegging og fremjing av undirvísingarvirkseminum og virka fyri, at avgerðir og strategiarbeiðið á øllum stigum í undirvísingargeiranum eru grundaðar á datagreiningar og hagtøl. Ítøkiliga skal arbeiðið við heildarætlanini:

- økja um kt- og dátutrygdina í undirvísingargeiranum
- økja um dygdina í upplýsingum um t.d. næmingar og lærugreinar (datarikin skúlamenning)
- veita skjótt og álítandi avgerðargrundarlag fyri politikkmenning (hagtøl)
- betra um samskiftið millum skúla, fakfólk, næmingar og foreldur
- beina av vegnum dupultarbeiði í fyrisitingini á skúlum, hjá myndugleikum og hjá næmingum
- skapa fortreytir fyri munadyggum eftirlits- og myndugleikaarbeiði.

Heildarætlanina hevur 3 høvuðsveitingar:

1. at menna eina felags framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan (Kervi+) til fólkaskúlan, miðnám og hægri útbúgvingar
2. at stovna ”Skúlanet”, ið er ein felags rakstrareind, sum rekur eitt vælvirkandi og trygt KT net fyri alt undirvísingarverkið
3. at stovna KT-hjálpina, sum er ein felags tænastueind, ið veitir skúlum og útbúgvingarstovnum ítøkiliga hjálp, vegleiðing og ráðgeving um KT-nýtslu og trygd.

KT-hjálpin er ein partur av Skúlaneti, sum er samstarv millum Gjaldstovuna, Nám og Undirvísingarstýrið.

## 3 Tíðarætlan

Í 2019 staðfestu forkanningar, at eingin av verandi KT-skipanum eftrlíkaðu krøvunum um KT-trygd og verju av viðkvomum persónsupplýsingum. Fleiri KT-skipanir kravdu umfatandi dagføringar, sum hvør sær vóru kostnaðarmiklar. Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fingu ikki álítandi hagtøl, ið eru fortreyt fyri ráðlegging, umsiting og menning.

Í 2020 varð heildarætlan fyri kt í undirvísingarverkinum løgd fram og handað landsstýrismanninum. Í 2021 samtykti Løgtingið, at farast skuldi undir at menna eina felags kt-lestrarfyrisitingarskipan (Kervi+) og eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið (Skúlanet). Hetta skuldi hjálpa skúlum og stovnum at umsita teirra tilfeingi og virksemi og bøta um kt-trygdina.

Í 2022 vóru menningarpallur og grundardata liðugt ment, og á heysti í 2023 fekk Fróðskaparsetrið, sum tann fyrsti brúkarin, atgongd til at brúka Kervi+. Sama árið fór KT-hjálpin til verka at veita ráðgeving og vegleiðing til brúkarar úti á skúlum og útbúgvingarstovnum.

Farast skal undir at íverkseta miðnámsskúlarnar. Sum sæst niðanfyri eru 4 skúlar komnir á Skúlanet (✓), undanverkætlan við Kervi+ er í gongd á 2 skúlum (U) og restin er ikki komin í gongd enn (X):

| **Skúli** | **Skúlanet** | **Kervi+** |
|---|---|---|
| Miðnám í Vestmanna | ✓ | U |
| Vinnuháskúlin | ✓ | U |
| Miðnám í Suðuroy | ✓ | X |
| Heilsuskúli Føroya | ✓ | X |
| Glasir | X | X |
| Miðnám á Kambsdali | X | X |
| Tekniski Skúlin í Klaksvík og Sjónám | X | X |

Verkætlanarleiðari skal saman við avvarðandi pørtum tryggja, at íverksetanin av Kervi+ og Skúlanet verður borin á mál í seinasta lagi 1. november 2026.

# 4 Verkætlanarskipan og høvuðsuppgávur

Arbeiðið verður skipað sum verkætlan umboðandi avvarðandi áhugapartar. Uppskot um verkætlanarskipan er orðað og skal brúkast í sambandi við at skipa arbeiðið við leiklutum, uppgávum og ábyrgd. Verkætlanarleiðari fær høvi til at viðgera uppskotið saman við Undirvísingarstýrinum og avvarðandi pørtum.

Roknast kann við, at verkætlanarleiðari kemur at savna seg mest um Glasir og Miðnám á Kambsdali (merkt við gráum), tí teir umboða tað størsta og mest fløkta virksemið.

**Kervi+**

Høvuðsuppgávan er at fyrireika og fremja eitt trygt skifti frá verandi fakskipanum til Kervi+. Hetta fevnir m.a. um at flyta data yvir virknar næmingar og starvsfólk úr gomlum skipanum í Kervi+ og at standa fyri upplæring av brúkarum (umsiting, lærarar, næmingar) og veita kt-hjálp á staðnum.

**Skúlanet**

Høvuðsuppgávan er at fyrireika og fremja eitt trygt skifti frá verandi kt-umhvørvi til nýggja umhvørvið í Skúlanet. Hetta fevnir m.a. um at rudda upp í brúkarum og data, at flyta data og skipanir í Skúlanet, seta upp net, at royndarkoyra loysnir og tryggja at net og atgongdir virka eftir vild, og at neyðugar skjalfestingar verða gjørdar.

# 5 Væntað tímatal og arbeiðsstaður

Samlaða tímatalið verður mett at verða umleið 750 tímar í virknari arbeiðstíð, men fyrivarni skal takast fyri, at talan er um verkætlanir, sum eru fløktar og kunnu hava týðandi óvissur. Undirvísingarstýrið kann bjóða arbeiðspláss, men væntast kann at verkætlanarleiðari kemur at brúka tíð á avvarðandi stovnum eisini.

# 6 Krøv til verkætlanarleiðara

Verkætlanarleiðari skal vera ein nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, ið velur at bjóða, so skal vera viðmerkt, hvør persónurin er, ið skal standa fyri uppgávuni. Tað er eitt krav, at verkætlanarleiðarin:

- hevur útbúgving frá hægri lærustovni
- hevur í minsta lagi 2 ára skjalprógvaðar royndir við verkætlanarleiðslu

- hevur royndir við grundleggjandi leiðsluamboðum
- hevur góða heildarfatan av KT
- dugir føroyskt, danskt og enskt í skrift og talu.

Tað vigar harumframt positivt, um verkætlanarleiðari hevur *viðkomandi útbúgving, royndir og persónligar dygdir*, tað er:

1. *útbúgving* frá hægri lærustovni, har kunningartøkni, leiðsla ella verkætlanarleiðsla heilt ella partvíst umboða útbúgvingina.
2. *royndir* við verkætlanum, sum hava strategiskan týdning og ávirka kjarnuvirksemið á einum stovni, har t.d. fakskipanir, integratiónir, dataflutningur og broytingarleiðsla er ein partur av uppgávuni.
3. *persónligar dygdir* sum t.d. at vera væl skipaður, empatiskur, miðvísur og ein góður samskiftari.

## 7 Krøv til tilboðið

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- navn og CV hjá verkætlanarleiðara
- navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku

Tilboðsveitari skal harumframt upplýsa:

**Prís**

- tímaprísur uttan mvg (lægsti tímaprísur er 700 kr.)

**Útbúgving**

- Heiti á útbúgving
- Heiti á útbúgvingarstovni
- Nær útbúgvingin er lokin

Um talan er um fleiri útbúgvingar, verður sami leistur brúktur fyri hvørja útbúgving.

**Royndir**

- Heiti á verkætlan
- Hvør kundin er, sum hevur umbiðið arbeiðið
- Longd á verkætlan (frá og til)
- Stutt lýsing av verkætlanarskipan og leiklutum
- Stutt lýsing av endamálinum við verkætlanini

Um talan er um fleiri verkætlanir, verður sami leistur brúktur fyri hvørja verkætlan.

# 8 Meting av tilboðum

Í metingini av innkomnu tilboðunum verður dentur lagdur á, at útbúgving og royndir kunnu skjalprógvast. Millum innkomnu tilboðini, sum lúka krøvini nevnd í pkt. 5, er metingarstøðið *prísur, viðkomandi útbúgving, viðkomandi royndir og persónligar dygdir*, sum telja soleiðis í metingini:

- prísur (50 %)
- viðkomandi útbúgving sambært. pkt. 5.1 (10 %)
- viðkomandi royndir sambært pkt. 5.2 ( 25 %)
- persónligar dygdir sambært pkt. 5.3 (15 %)

Niðanfyri eru dømi víst, hvussu Undirvísingarstýrið metir um tilboðið.

**Prísur (50 %)**

Tímaprísur skal verða grundaður á effektiva arbeiðstíð. Lægsti tímaprísur er 700 kr. u/mvg. Bjóðar tilboðsveitari undir 700 kr., verður tímaprísurin á 700 kr. kortini brúktur í metingini. Tilboðið við lægsta tímaprísinum fær 50 stig. Onnur tilboð fáa stig í mun til lægsta tímaprís, sí dømi um útrokningarhátt niðanfyri:

| **Tilboð** | **Prísur** | **Útrokning** | **Stig** |
|---|---|---|---|
| Tilboð A | 750 | (700 / 750) x 50 | 47 |
| Tilboð B | 800 | (700 / 800) × 50 | 44 |
| Tilboð C | 850 | (700 / 850) × 50 | 41 |

**Útbúgving (10 %)**

Umframt útbúgving frá hægri lærustovni, sum er kravið fyri at veita tilboð, vigar tað positivt, um útbúgvingin er í kunningartøkni, leiðslu ella verkætlanarleiðslu (sí pkt. 5.1). 5 stig verða givin, um tilboðsveitari kann skjalprógva útbúgving frá hægri lærustovni (bachelor og/ella master) í ávikavist kunningartøkni og leiðslu/verkætlanarleiðslu. Hægsta stigatalið er 10. Sí dømi um útrokningarhátt niðanfyri:

| **Tilboð** | **Bachelor** | **Master** | **Stig** |
|---|---|---|---|
| Tilboð A | - | 5 | 5 |
| Tilboð B | 5 | - | 5 |
| Tilboð C | 5 | 5 | 10 |

**Royndir (25 %)**

Umframt 2 ára royndir við verkætlanarleiðslu, sum er kravið fyri at veita tilboð, vigar tað positivt, um tilboðsveitari seinastu 5 árini kann vísa á royndir við kt-verkætlanum (sí pkt. 5.2). 5 stig verða givin fyri hvørt árið, tilboðsveitari seinastu 5 árini hevur arbeitt við kt-verkætlanarleiðslu. Sí dømi um útrokningarhátt niðanfyri:

| **Tilboð** | **Kt-verkætlanarleiðsla** | **Stig** |
|---|---|---|
| Tilboð A | 3 ár x 5 | 15 |
| Tilboð B | 4 ár x 5 | 20 |
| Tilboð C | 4 ár x 5 | 20 |

Hægsta stigatal er 25, sum svarar til 5 ár samanlagt. Undirvísingarstýrið ger í hvørjum einstøkum føri ítøkiliga meting av, hvussu viðkomandi royndirnar eru, og kann krevja, at royndir verða skjalprógvaðar. Royndir, sum ikki kunnu skjalprógvast, fáa ikki stig.

**Persónligar dygdir (15 %)**

Tá ið innkomnu tilboðini eru viðgjørd verða útvaldir tilboðsveitarar bodnir til samrøðu, áðrenn endalig støða verður tikin. Endamálið er partvíst at greiða møgulig ivamál við førleikum og royndum og partvíst at meta um persónligar dygdir.

Vit leita eftir einum verkætlanarleiðara við sterkum persónligum dygdum, og sum dugir at leiða uttan formliga starvsfólkaábyrgd. Vit ynskja ein verkætlanarleiðara, sum er empatiskur og dugir at skapa álit, sum er væl skipaður. Hann skal duga at fylgja málum og at samskifta greitt og væl við nógvar ymiskar áhugapartar.

Persónar, sum til fulnar verða mettar at hava nevndu ella aðrar líknandi dygdir, fær 15 stig.

**Samlað stigatal**

Samlaða stigatalið verður síðan roknað sum prísur + útbúgving + royndir + persónligar dygdir, sum sæst í døminum niðanfyri:

| **Tilboð** | **Prísur + royndir + persónligar dygdir** | **Stig** |
|---|---|---|
| Tilboð A | 47 + 5 + 15 + 10 | 77 |
| Tilboð B | 44 + 5 + 20 + 10 | 79 |
| Tilboð C | 41 + 10 + 20 + 10 | 81 |

Tilboðið, sum hevur hægsta samlaða stigatali, vinnur útboðið. Undirvísingarstýrið tilskilar sær rætt til ikki at gera brúk av tilboðunum.

# 9 Tíðarfreistir

Tilboð skulu sendast til: mortanz@uvs.fo í seinasta lagi **mánadagin 3. november kl. 12:00**.

Miðað verður eftir, at sáttmálin er undirskrivaður í seinasta lagi fríggjadag 7. november 2025. Útboðstilgongdin er lýst í yvirlitinum niðanfyri:

| **Dagur** | | **Hending** |
|---|---|---|
| Kunngerð: | 20/10 | Útboð verður lýst á keypsportalinum: mánadagin 20. oktober kl. 12.00 |
| Spurnarfreist: | 27/10 | Freistin at seta spurningar er mánadagin 27. oktober kl. 12.00 |
| Innlatingarfreist: | 03/11 | Freistin at lata tilboð inn er mánadagin 3. november kl. 12:00 |
| Viðgerð: | 03/11 og 04/11 | Viðgerð og møguligar samrøður fara fram mánadagin 3. og týsdagin 4. oktober |
| Undirskriving: | 06/11 ella 07/11 | Sáttmáli verður undirskrivaður eftir avtalu ein av døgunum hósdag 6. ella fríggjadag 7. oktober |
| Veitaradagur: | 01/12 ella áðrenn | Veitaradagur er mánadagin 1. desember ella skjótast til ber áðrenn hetta |

# 10 Nærri kunning

Nærri kunning um verkætlanina finst á heimasíðuni www.skulin.fo.

Eru spurningar til útboðstilfarið og uppgávuna, ber til at venda sær skrivliga til Mortan Zachariassen telduposti: mortanz@uvs.fo í seinasta lagi 27/10 kl. 12:00. Spurningar verða svaraðir skrivliga og eru dulnevndir. Spurningar og svør verða kunngjørd á keypsportal.fo.